# a – ikki

**Hvussu fáa vit útbúnar føroyingar heimaftur? Og hvussu koma vit undirskotinum av kvinnum til lívs? Hesir spurningar seta við jøvnum millumbilum dagsskránna í almenna kjakinum í Føroyum. Fýra fyrrverandi útisetar við ymsum royndum á føroyska arbeiðsmarknaðinum greiða niðanfyri frá sínum upplivingum av at flyta til Føroya og virka í Føroyum. Rís og rós til lítla landið, sum kanska ikki er so galið kortini**

## "Man gleðist um framstigini og harmast um ómegdina"

Jenny Petersen **hevur verið stjóri á Tjóðpalli Føroya síðani 2005. Hon flutti til Føroya í 2000 eftir trettan ár í Noregi, har hon starvaðist sum framleiðslustjóri í norskum leikhúsi.**

**Hvat hevur verið tað besta við at flyta heim?**
*Tað besta hevur vælsaktans verið, at eg havi havt eitt ótrúliga spennandi starv og havi upplivað framstig innanfyri føroyska leiklist. Fyrst at Tjóðpallur Føroya var stovnaður í 2003 við stórum meiriluta á tingi, og síðani at játtanin spakuliga er vaksin, hóast hon framvegis er alt ov lítil. Eg havi ongantíð angrað, at eg kom heim, og eg havi trivist í mínum arbeiði. Responsurin frá fólkinum hevur eisini verið positivur, tá Tjóðpallurin hevur hýst alskyns sjónleikum, og tað er lívsjáttandi at uppliva, at man kanska ger ein mun. Ein styrki við einum lítlum samfelagi sum tí føroyska er júst, at tað er lættari at gera mun og at gera okkurt, sum ikki hvørvur í mongdini av øðrum tilboðum. Tað er ein grundleggjandi tørvur, sum lættari er at nøkta í Føroyum samanborið við evropeiskar stórbýir.*

**Hvat hevur verið tað ringasta við at flyta heim?**
*Tann fyrsta tíðin var nokkso tung. Tá man er útiseti og bara vitjar í feriunum, so fær man eina illusión um, at tað altíð er so gott í Føroyum, sum tað er um summarið. Tá man so finnur útav, at tað hendir alt ov lítið ímillum hásesongirnar, kunnu Føroyar blíva keðiligar samanborið við tað pulserandi lívið uttanlands. Og tá kemur útlongsulin krúpandi.*

*Tað eru heilt einfalt ov fá tilboð í Føroyum á fleiri ymiskum økjum. Tey smáu forholdini, tað manglandi tolsemi og tað trongskygni, sum onkuntíð eyðkennir lívið á oyggjunum, er eisini nakað, man sum útiseti leggur merki til og stundum kvalist av, tá man er fluttur heimaftur. Og í mínum starvi ilskast man mangan inn á hugburðin til mentan og list – hóast áðurnevndu framstig. Eg ivist í, um politikararnir vistu, hvat teir bundu seg til, tá Tjóðpallurin varð stovnaður, tí peningurin hevur ikki heilt fylgt við. Samanumtikið gleðist man um smáu framstigini og harmast um, at tað gongur ov seint.*

**Hvat skulu vit gera fyri at fáa útisetar heimaftur?**
*Týdningarmiklasti spurningurin hjá einum og hvørjum politikara í Føroyum er, hvussu fáa vit fólk at trívast? Hvussu fáa vit ung, barnafamiljur, tilkomin og eldri fólk at trívast, bæði kvinnur og menn? Tað er m.a. við at økja um sosialu og mentanarligu tilboðini. Um eg aftur kann loyva mær at fokusera snævurt uppá tað mentanarliga, so var eitt tiltak sum Listastevnan fantastisk fyri Føroyar. Ein rúgva av fólki vóru aktiverað størsta partin av árinum, og føroyingar í hópatali fingu spennandi listarligar upplivingar. Fleiri útisetar eftirlýsa m.a. eitt størri mentanarligt útboð, og tí var tað spell, at tiltakið datt niðurfyri.*



## "Vit mangla kvinnur og útlendingar"

Erika Hayfield **hevur búð tjúgu ár av sínum lívi í Edinburgh í Skotlandi. Hon hevur lisið marknaðarføring og hevur eina Ph.D. í forbrúkaramentan. Hon flutti seinast heim í 2003, hevur arbeitt í føroysku samskiftisvinnuni og er nú fulltrúi í Vinnumálaráðnum.**

**Hvat hevur verið tað besta við at flyta heim?**
*Tað er komið óvart á meg, hvussu nógv spennandi og dugnalig fólk í roynd og veru búgva og virka í Føroyum. Áðrenn eg flutti heim, hevði eg sum so nógvir aðrir útisetar ein fordóm um, at tá man flytur heim, so merkir tað, at yrkisleiðin steðgar upp. Men soleiðis er ikki. Tað er lætt at blanda seg í nógv ymisk mál og gera mun, um tú veruliga vil. Og negativi hugburðurin millum útisetar um Føroyar er í ein mun ógrundaður.*

**Hvat hevur verið tað ringasta við at flyta heim?**
*Tá eg kom heim, sló tað meg, hvussu ósjónligar kvinnurnar vóru í hesum landinum. Eg havi als ikki verið tilvitað um javnstøðuspurningin fyrr, men undirskotið av kvinnum og skeiva valdsbýtið millum menn og kvinnur er møguliga tann størsti samfelagstrupulleikin yvirhøvur. Og talan er ikki um ein kynskamp, men um ein samfelagstrupulleika, sum rakar bæði menn og kvinnur.*

*Ein annar veikleiki er okkara vantandi sjálvsálit. So skjótt sum ein útlendingur kemur til landið og sigur eitt ella annað, eru øll á gosi, hóast onkur føroyingur hevur sagt tað sama í mong ár. Vit trúgva ikki uppá okkum sjálvi og skulu ofta hava onkran uttanífrá at siga okkum, hvussu verðin hongur saman. Og tað hongur partvís saman við, at vit hava lyndi til at umganga innanhýsis konfrontatiónir. Konstruktivt kjak verður alt ov ofta uppfatað sum persónligar konfliktir, kanska tí vit liva so tætt upp at hvørjum øðrum í einum so lítlum samfelagi. Og kollektivt halda vit hvørjum øðrum niðri, tí vit hava ikki dirvi til at seta krøv, vera kritisk og taka nakrar neyðugar, konstruktivar konfrontatiónir.*

**Hvat skulu vit gera fyri at fáa útisetar heimaftur?**
*Her og nú áttu vit at styrkt um samskiftið við okkara útisetar fyri at bjóða tí hugburðinum av, sum sigur, at eingir møguleikar eru í Føroyum. Miðvís marknaðarførsla og skipaður dialogur við okkara útisetar hevði møguliga punkterað nakrar mytur um Føroyar og fingið fleiri heimaftur. Men tað er skeivt einans at fokusera uppá føroyskar útisetar, tí vit hava eins nógv brúk fyri útbúnum útlendingum.*

*Í longdini mugu vit spyrja okkum sjálvi, hví kvinnurnar ikki støðast, og hví tær eru so ósjónligar, sum búgva her. Í hesum sambandi treingja vit til eina grundleggjandi kollektiva hugburðsbroyting, um Føroyar í framtíðini skulu rúma báðum kynunum. Og hóast tað møguliga er politiskt ókorrekt, so kann eg ikki lata vera við at nevna, at vit hava brúk fyri einum sterkum høvuðsstaði. Eisini um tað merkir ein veikari útjaðari. Vit eru so fá og smá, at vit mugu velja, hvar miðdepilin skal vera, og hvar vit skulu satsa. Flestu útisetarnir eftirlýsa nevniliga eitt sterkt miðstaðarøki.*

